NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Minningarorð um Asaf Olsen í Søldarfirði



9.apríl í ár andaðist Asaf Olsen úr Søldarfiri 77 ára gamal. Asaf, sum var næstyngstur av teim 8 børnunum hjá bóndahjúnunum á Heimbø, Ingu og Ola Jákupi Olsen, var borin í heim tann 13.juni 1927. Inga doyði bert hálvt annað ár seinni í barnferð við dóttur, sum kom at bera navn mammunar víðari.

Hegnisliga greiddi presturin Meinhard Bjartalíð við jarðarferðina frá lívi og tilveru Asafs. Millum annað, frá jólakorti sum mamma hansara sendi honum av sanatorinum, har hon lá sína síðstu tíð.

Eg kom at kenna Asaf eftir at vit á heysti í 1963 fluttu til Søldafjarðar og blivu grannar hjá honum, Oslu og børnum teirra. At Asaf var ein góður granni komu vit at merkja við tað sama. Trímenningar vóru pápi og hann. Kanska var tað tí genetiskt betónað, at hugsunarháttur teirra á mongum økjum bar saman.

Helst var tað av somu grund, at vit systkin sóu stórt í hesum manni og vóru ikki sørt stolt av at kenna hann og vera grannar hansara. Hetta gjørdi seg ikki minst galdandi tá nýbygningarnir av Skála Skipasmiðju so fríir í ásjón fóru eftir fjørðinum, sín fyrsta túr, við Asafi sum ovast kommanderandi.

Asaf var av allar vakrastu monnum. Hetta veri seg bæði í ásjón og holdningi. Fattur og vælklæddur heilt til tað seinasta.

Hansara yrki bleiv á Skála Skipasmiðju og har helt hann á, eisini eftir at hann gjørdist sjeyti ár.

Harútyvir var hann alla sína tíð tætt knýttur at jarðarbrúkinum á Heimbøgarðinum. So leingi hann orkaði at fáast við haga og seyð, var hann mitt í rokanum - altíð sum ein ella annar tappur, sum var har sum mest var brúk fyri tí. Harumaður var hann alt tað eg visti um. Hoyrdust skot omanvert bøgarðarnar eftir 2. novembur, so var altíð Asaf fyrst í tonkunum á einum. Og mangar túran átti hann at húsum við harum í fetlinum.

Hann var ikki maður sum troðkaði seg frammat nakrastaðni, men hann var at finna har sum nakað var á vási í bygdarlívinum. Ein bygdarmynd av serligum karat.

Til seinasta kommunuval var hann ikki millum teirra sum kallaði saman til fundar at fáa uppstillingina frá hondini. Tað mundi eisini vera fyrstu ferð í langsamuliga tíð.

Sum hjá øllum teimum sum hava fingið lívsins gávu, og uppnáa at síggja lívssólina dala í vestri, so merktist eisini á Asafi, at hann gekk leiðina fedrarnir hava gingið, hvar ungdómsins og manndómsins kreftir og áræði, máttu víkja fyri holdsliga klædnabúnanum, sum skaparin hevur valgt at íklæða okkum, áðrenn hann tekur okkum aftur at húsum.

Fryntligur og lættsintur var hann heilt at gáttini til ævinleikan. Hann gekk ikki av vegnum fyri fólki, men kom á tal við øll sum hann møtti.

Ikki sást á honum, at hann var við at vera ferðabúgvin, men kom tú á tal við hann so merktist tað, og hann gjørdi eisini vart við tað sjálvur.

Asaf ávirkaði síni umgevilsir, og ávirkan hansara á alt og øll var positiv. Tí er tað við takklæti og sorgblídni at sagt verður eitt jarðiskt farvæl við hann. Men tað verður eisini sagt í vónini um, at hann sum øllum ræður eisini hesaferð visti hvat hann gjørdi, tá hann tók Asaf heim til sín.

Ærað veri minni um Asaf Olsen.

**Sámal Petur**

Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo

**Dagurin**

**21. juni.** Longsti dagur. Sólstøður, tá ið sólin stendur hægst á luftini um miðdagin. Kann vera 21. ella 22. juni.

Dagurin eitur eisini **Albanus**. Hann var úr Onglandi, og gjørdist biskupur í Mainz, har hann varð hálshøgdur, tá ið vandalar um ár 400 søktu at býnum.

Tekniski Skúlin í Klaksvík:

# Húsasmiðir og elektrikarar fingið prógv



Fríggjadagin fingu tveir húsasmiðir og seks elektrikarar prógv á Tekniska Skúla í Klaksvík. Teir koma frá læruplássum í Eysturoy og Klaksvík.

Frá vinstru á myndini: Sigmar Sørensen, Norðdepil, húsasmiður, lærupláss Sp/f Norðhús, Óli Olsen, Leirvík, húsasmiður, lærupláss Sp/f J+H, Sofus Gilstein Samuelsen, elektrikkari, lærupláss P/f Tummas Thomsen, Sverri Vilhelm, elektrikkari, lærupláss P/f Tummas Thomsen, Dánjal Johannesen, elektrikkari, lærupláss P/f Tummas Thomsen, Bogi Sivertsen, elektrikkari, lærupláss P/f El-Inn